# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sorgarleikur í Iran

Kunningar- og samskiftistøknin hevur broytt heimin. Tá kinversku einaræðisharrarnir á sinni bardu friðarligu mótmælisfundirnar á Himmalfriðartorginum niður, frættu vit um ófriðin, víst so. Men tað gingu vikur, mánaðir og ár, áðrenn umheimurin fekk at kenna alla tilgongdina. Myndugleikarnir høvdu vald og tøkni til at forða umheiminum at fáa sannleikan um hendingarnar at kenna. Hetta at forða fyri kunning, at dylja vitan og innlit hevur altíð eyðkent einaræðiligar stjórnir. Men heimurin er broyttur. Kunningar- og samskiftistøknin hevur broytt alt, og eingin stjórn megnar í dag at forða umheiminum at síggja, havt, ið gongur fyri seg í viðkomandi landi.

Hóast stjórnin í Teheran sensurerar fjølmiðlarnar, forfylgir innlendskum og útlendskum journalistum, roynir at typpa internetið og hevur tikið burtur møguleikarnar at senda SMS, so megnar stjórnin ikki at forða kunningarstreyminum í at renna allar vegir. Ayatollarnir hava ikki ræði á Facebook og Twitter, og tí kunnu fólk um allan heim við egnum eygum síggja, hvussu stjórnin við harðari hond kúgar tey, sum á gøtum og torgum krevja sín demokratiska rætt. Hvat meira er: vit síggja tað, sum hendir, samstundis sum tað hendir. Milliónir sóu í gjár kollveltingarhirðmenn skjóta unga kvinnu. Kvinnan doyr fyri eygunum á milliónum um allan heim.

Eingin kann verða óávirkaður av slíkum hendingum og ávirkanin er ikki minst sterk í sjálvum Iran. Støðið undir átrúnaðarligu einaræðisharrarunum, teokratunum, fer at rilla. Teir hava ikki longur sama tak á hugaheimi fólksins, sum áður. Fólk verða ávirkað úr øllum ættum. Teokratarnir eru um at missa monopolið uppá at tulka heimin – eru um at missa tað monopolið uppá sannleikan. Kunningar- og samskiftisttøknin hevur brotið hetta monopolið og fólk, serstakliga ungfólk, í túsundatali eru til reiðar at vága lívið til tess at vinna tað persónliga og politiska frælsið, sum teokratarnir hava noktað teimum í trýati ár.

Iran hevur sermerkta politiska skipan við ávísum "demokratiskum" stovnum undir eftirliti av átrúnaðarligum stovnum, ið ikki eru demokratiskt valdir. Valdið er í veruleikanum í hondunum á átrúnaðarligum eftirlitsráði, og formaðurin Khamenei hevur tí eins nógv ella meira vald enn forsetin. Alt gekk ikki rætt til á forsetavalinum herfyri, og eitt av valevunum, Moussavi, og viðhaldsfólk hansara krevja atkvøðurnar taldar av nýggjum undir eftirliti. Hetta við mótmælisgongum at vísa nøgd ella misnøgd er ein grundleggjandi demokratiskur rættur og menniskjan letur sær ikki alt lynda. Hetta hevur heimurin sæð mong dømi um. Hesin sami heimur heldur nú ondini, meðan sorgarleikurin fer fram á gøtunum í Teheran. Einki av demokratisku stórveldunum hevur hug at leggja uppí, tí hildið verður, at hetta bert ger ilt verri. Næstu dagarnir verða avgerandi fyri lagnuna hjá tí ungu demokratisku rørslu, sum hevur tikið seg upp og øll demokratiskt sinnað fólk vóna, hóast døpur útlit, tað besta fyri hesa rørslu.

**Sosialurin**

## Hegrin í Blásenda



**KÁRI Á RÓGVI**
løgtingsmaður

Nú prýðiligt bókasavn er latið upp Heima á Sandi er at vóna, at hetta bert er fyrsta stigið til tess at mentanarbúskapur kann lyfta oynna, men enn tykist tó ikki venda rætt við raðfesting.

Tá ið viðgerð var á tingi herfyri, ið Kári P. Højgaard reisti um bókasavni og manglandi stuðulin frá landinum, rann mær til hugs gomlu søguna um hegran og tann stóra fiskin.

Mær tykir, at verður nøkur bók at liggja frammi á lesistovuni í Gávuni Miklu, so má tað vera fábulin um hegran. Tann góði hegri var soleiðis vorðin, at hann vildi bert hava tann stóra fiskin. Tískil stóð hann og vóð hann í tjørnini tann líðilanga dag og lata hvørt sprell og hvørt kykt gleppa sær nevi, vildi ikki taka nakra spraggu ella smásíl, tí so rúmdist ikki stóri fiskur í gørnini. Men út leið á kvøldið, og hann stóð svangur eftir. Tá ið myrkrið seig samanum hann, hevði hann onki notið av øllum tí góða, ið rakst framvið; lat alt fara, tí hann bíðaði eftir tí stóra fonginum.

Soleiðis tykir mær tíverri tann fólkavalda úr oynni, ið á løgtingi letur alt fara framvið. Tunnil til Dals, listaskúla, stuðul til bókasavns, onki má svølgjast, tí so verður ikki pláss fyri tí stóra fiskinum. Sjálvt tá ið umrædur kommunuskuldini, er ongi loysn at hóma. Veruleikin er, at hini 32 á tingi høvdu verið hjartansfegin at strika alla kommunuskuldina í Sandoynni, um bert tunnilin var útsettur óásett. Tí samlaða kommunuskuldin er bert millum fimtanda- og tjúgundapart av teirri upphædd, ið krevst at bora fyri – ella, boringin er so dýr, at hon er ótaldar ferðir størri enn aðrar íløgur í oynni.

Nú áðrenn tingið fór til hús, hendi tað løgnasta í hesi tilgongd. Lógin um tunnilin varð avtikin, uttan at nærri er komið at linjuføring ella figging. Bert tvær milliónir vórðu settar í hetta felag, sum helst verður tvingsilsavtikið, tá ið milliónirnar eru etnar. Samstundis vórðu hálvtriðjahundrað milliónir settar í tveir aðrar tunnlar – enntá við viðmerking um tann triðja. Hetta svarar til, at Gerhard stendur á Gomlu Rætt við einum stórum traileara, ið kanska akkurát sleppur umborð á Teistan; nú kemur vinmaðurin Anfinn pressandi oman við stórum oljubili við anhengara, og Mikkjal við stórum blandibili – og teir spyrja, um teir ikki 'líka kunnu sleppa umborð fyrst.' Gerhard bakkar, hetta eru jú hansara sonnu vinir, ikki sum hasir Kárarnir, ið mæla honum til at bíða til næsta túr vegna fíggjarliga trongstøðu; so sandoyartingmaðurin bakkar langt og bíður teir vælsignaðar koyra umborð undan honum.

Kanska ikki so løgið, at hegrin nú er farin at jakstra annan fugl, tá ið allur fongur er farin.

**Latið ikki alt fara við rákinum**

Sandoyggin er mest forlovaða oyggj í landinum; teimum er lovað og lovað – for ofta. Var skil á, so legðist oyggin saman, fekk skuldarfrælsi, listaskúla, eftirskúla, ferðamannavinnu og skeiðsdepil, ja hvønn smáfong, ið til bar at krøkja.

Fyri meg er serliga vónríkt at hugsa um, at skúlaskapur á Sandoynni kann taka seg upp, tí abbi mín, barnvaksin á Mølini í Skálavík, skrivaði lærubøkur til búnaðarskúlans, ið koma skuldi. Á Norðlandinum í Íslandi er í dag búnaðarskúli tegndur at upplivingarbúskapi. Upplagt var, at ungmenni kundu lært seg bæði at ambæta neytum og ferðafólki á skúla í Sandoynni.

Nógvir slíkir smáfiskar kundu fylt tægurnar, eisini meðan bíðað verður eftir stórfongi.

## SSP samstarvið skal fyribyrgja harðskap



**ANNIKA OLSEN**
landsstýriskvinna í innlendismálum/ lógarmálum

Harðskapur er ein vorðin gerandiskostur eisini hjá okkum í Føroyum. Fyri fáum árum síðani bleiv tað oftani ført fram, at í Føroyum var ongin kriminalitetur, men hetta kunnu vit ikki breggja okkum av longur. Dagliga hoyra vit um, grovan harðskap, skottilburðir, rúsevnismisnýtslu o.s.fr. Vit kunnu ikki longur lata eyguni aftur fyri hesum veruleika, men royna at gera, hvat vit kunnu til tess, at hetta ikki verður so umfatandi. Revsilógin, ið varð samtykt her fyri við 52 broytingum, umfatar nógvar herðingar av revsingum, ið hava við harðskap og brotsgerðir at gera m.a. hækkar revsikarmurin fyri grovan harðskap, rúsevnissmugling, neyðtøku v.m.

At herða revsingina fyri tílíkar brotsgerðir er gott, men loysir hetta ikki allan trupulleikan, tí sum oftast er tað ein orsøk til, at fólk enda úti í einum kriminellum umhvørvi.

Fyri at fyribyrgja kriminalitet, raðfesti henda samgongan eisini at styrkja tað fyribyrgandi arbeiðið, m.a. at geva løgregluni ta neyðugu lógarheimildina í rættargangslógini, soleiðis at løgreglan kann vera ein virkin partur í SSP samstarvinum.

**SSP**

SSP er eitt tvørfakligt samstarv millum skúlan, sosialar myndugleikar og løgregluna. SSP samstarvið hevur ein týðandi leiklut til tess at fyribyrgja harðskap, herverk og misnýtslu millum ung. Endamálið við hesum samstarvi er, at man arbeiðir fyribyrgjandi og setur inn tíðliga, soleiðis at ung kunnu fáa leiðbeining og hjálp, áðrenn tey koma út í kriminalitet. Myndugleikarnir, ið eru umfataðir av samstarvinum skulu kunnu geva víðari upplýsingar, ið kunnu hava týdning fyri harðskap millum ung. Higartil hevur tað ikki verið heimilað løgregluni at geva víðari upplýsingar, sum tey sita inni við. Hetta er nú broytt, soleiðis at heimild er givin í rættargangslógini grein 115 b. Løgreglan kann nú vera ein virkin partur í SSP samstarvinum og geva týðandi upplýsingar víðari til skúla og sosialar myndugleikar um ung, ið vísa seg at hava harðliga atferð og harðligan atburð. Upplýsingar, ið kunnu gevast víðari skulu vera liður í einum fyribyrgjandi samstarvi millum myndugleikar og ikki upplýsingar, ið hava til endamáls at eftirkanna revsimál.

Vit skulu á øllum økjum hjálpa ungum, ið vísa seg at hava álvarligar trupulleikar og hava harðligan atburð. Orsøkirnar til hendan harðskap kunnu vera nógvar t.e. umsorgarnarsvikt, drukkin foreldur, happing o.a. Hesi ungu skulu ikki sleppast upp á fjall, men fáa ta hjálp teimum hava fyri neyðini soleiðis at tey ikki enda í einum kriminellum umhvørvi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.